# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sosialráðgevi til Psykiatriska depilin – Endurlýsing

Eitt fulltíðar farloyvisstarv er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt og eitt ár fram.

Sosialráðgevin arbeiðir í tøttum samstarvi við onnur toymi og luttekur í toymum eftir førleika, tørvi og ynski.

**Vit kunnu bjóða**
- eitt spennanadi tvørfakligt arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum.
- góðar møguleikar fyri menning
- nógvar avbjóðandi uppgávur á einum arbeiðsplássi í menning

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
- kunna ráðgeva og vegleiða sjúklingum og teirra avvarðandi um sosial viðurskifti
- verða bindilið sjúklingsins til aðrar stovnar
- verða samskipari í mun til aðrar partar í oftani torførum málum
- tryggja sosialfakliga partin í tvørfakliga samstarvinum

**Førleikakrøv**
- útbúgving sum sosialráðgevi
- góð samstarvsevni, ídni, hug og dirvi til at luttaka í einum sera fjøltáttaðum arbeiði saman við øðrum fakbólkum
- royndir ella áhuga í at arbeiða við sálarsjúkum
- førleika og royndir til at fremja sjálvstøðugt virksemi
- verða við í menningini av psykiatrisku viðgerðartilboðunum
- teldukunnleika

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Tormóð Stórá, leiðandi yvirlækna á tlf. 304500, lokal 4100, e-post lstost@ls.fo ella Ann Britt Mortensen, sosialráðgeva, lokal 4176, e-post lsannmr@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 3. oktober 2008 kl. 12.00**

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum

(sí meira á www.lsh.fo)

**Sjúkrarøktarfrøðingur til A2/Føðideildina**
Umsóknarfreistin er 22. september 2008 kl.12.00

**Starvsfólk til Útbúgvingarlonina á D7**
Umsóknarfreistin er 26. september kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B7**
Umsóknarfreistin er 29. september 2008 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn







**Á Landssjúkrahúsinum**
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

# DANSISKEIÐ



*Eins og undanfarnu ár skipar Dansifrøi fyri dansifrálæru í gomlum sum nýggjum dansum. Dansiskeiðið verður í Róðrarneystinum á Argjum og í Veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum.*

| | |
|---|---|
| <u>Mikukvøld:</u> | <u>Fólkadansir/Eingilskur dansur & dansispøl</u> |
| Bólkur 1: | kl. 19.30 til 20.30 Nýbyrjarar |
| Dansileiðari: | Sebastian Eriksen |
| Tilmelding á tlf.: | 213816 / 313788 ella til t-postadr: dansifroi@olivant.fo |

Kostnaður fyri dansiskeiðið 2008/2009 kr. 500,00

Dansifrálæran verður í Róðrarneystinum á Argjum.

| | |
|---|---|
| <u>Týskvøld:</u> | <u>Fólkadansir/Dansispøl</u> |
| Bólkur 2: | kl. 19.30 til 21.30 Tey ið hava dansað í 2 ár ella meira |
| Dansileiðarar: | *fyrra vetrarhálvárið* Matilda og Tom Nielsen |
| | *seinna vetrarhálvárið* Ruth og Jógvan Martin Mørk |
| Tilmelding á tlf.: | 213816 / 313788 ella til t-postadr: dansifroi@olivant.fo |

Dansifrálæran verður í Róðrarneystinum á Argjum.

| | |
|---|---|
| <u>Týskvøld:</u> | <u>Fólkadansir/Dansispøl</u> |
| Bólkur 3: | kl. 19.00 til 20.30 Argentinskur tango |
| Dansileiðarar: | Anne Lise og Mads Andreas Winther |
| Tilmelding á tlf.: | 315310 ella til t-postadr: mawalw@olivant.fo |
| Bólkur 4: | kl. 20.30 til 22.00 Fólkadansir |
| | Blanda hold við livandi tónleiki |
| Dansileiðari: | Sharon Weiss |
| Tilmelding á tlf.: | 314815 / 217119 ella til t-postadr: sharon.weiss@skulin.fo |

Dansifrálæran verður í Veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum.

Kostnaður fyri dansiskeiðið 2008/2009 kr. 600,00

Dansiskeiðið byrjar mánakvøldið 29. september 2008 til 18. mars 2009.
Áhugaði verða biðin um at tekna seg sum skjótast.
Gjaldast skal við fyrsta frálærutíman.

Dansifrøi

# Alt timburarbeiði

verður gjørt skjótt og professionelt
Garanti verður latið

JPE BYG

J.P. EGHOLM
Timburmaður
Trollhättanvej 18 - 2 tv.
9800 Hjørring
Fartlf. (+45) 40475331
jpebyg@mail.dk
www.jpebyg.dk



**RING OG FÁ EITT ÓBINDANDI TILBOÐ**







# Volvo S40 til sølu – *økonomiskur luksusbilur*

Sera væl hildin ikki-roykjara bilur. 1.8 bensin við 125 hk. Árg. 10/2005, koyrt 31.000 km. Hevur ljósagrá leðursetur, leður róður, leður gearknobb v/alu, alu-panelir, el-spegl, orig. 17" alu-felgur, niðurbl. bakkspegl v/kumpass, klimaanlegg, innbygd barnasetur aftan o.m.a. Er sum nýggjur bæði innan og uttan. Hevur bert havt 1 eigara.

**Bilurin kann síggjast og roynast hjá Ivan Johansen.**